## DAGSINS MEINING

# Flogvøllurin útbyggjast

Tað er alkunnugt, at danska stjórnin hevur verið meira enn trek at fara undir at útbyggja og dagføra Vága floghavn. Tað er eins alkunnugt, at neyðugt er við eini munagóðari útbygging og eini hart tiltrongdari dagføring. Ferðslan økist, og flogførini broytast. Fyrr ella seinni fer Atlantic Airways at skifta flogførini út, og eigur felagið tá sjálvsagt ikki at verða bundið av einum ov stuttum og ótíðarhóskandi flogvølli. Trupulleikin við ov stuttum lendingarbreytum er júst vorðin ein forðing fyri útbygging av flogferðsluni í Grønlandi. Har er støðan tann, at floghavinirnar kunnu bert taka í móti nøkrum heilt ávísum sløgum av flogførum, og er hetta einn meinbogi fyri útbygging av flogferðsluni. Tað verður eisini neyðugt við kapping á Føroyarutuni, og tí eiga allar forðingar fyri frælsari kapping at verða beindar burtur. Ein floghavn, ið bert tekur flogfør hjá einum ávísum flogfelag, er ein kappingarforðing. Sostatt eru nógvar góðar grundir til sum skjótast at útbyggja og dagføra Vága floghavn.

Tað er tí sera áhugavert, at danska stjórnin nú tykist at vilja flyta seg í spurninginum um útbygging av Vága floghavn. Sum kunnugt hevur løgmaður umrøtt málið við forsætisráðharran á ríkisfundinum herfyri. Danska stjórnin hevur greitt fingið at vita, at hon eigur Vága floghavn, og at stjórnin tískil hevur skyldu at síggja til, at floghavnin er í fullt nútímansgjørdum líki, tá hon verður yvirtikin av føroyskum myndugleikum. Sjálvandi skulu vit yvirtaka Vága floghavn, men vit eiga ikki at yvirtaka hana fyri einhvønn prís.

Tað er bæði rætt og gott, at danska stjórnin nú klárt og greitt hevur fingið at vita, at stjórnin ikki bara kann krevja, at vit yvirtaka Vága floghavn her og nú, av tí at staturin nú hevur tann politikk, at sleppa statinum undan at reka floghavnir. Yvirtøkan eigur sjálvsagt at fara fram við skili. Hetta merkir, at Vága floghavn skal vera fult og heilt útbygd og tipp topp nútímansgjørd, áðrenn han kemur á føroyskar hendur. Annað er so tað, at vit møguliga kunnu taka lut í fíggingini av útbyggingini, um danski staturin, sum er ein hin ríkasti í heiminum, ikki hevur ráð at gjalda fyri alla útbyggingina. Í so fall eiga vit at umhugsa føroyska luttøku í fíggingini. Men herfrá og so at turka allan kostnaðin, einar 2-400 milliónir uppá føroyska skattgjaldaran, tað gongur als ikki. Tað hvørki kunnu ella eiga føroyskir myndugleikar at góðtaka. Í hesum máli sum í so mongum øðrum málum, skal ríkisfelagsskapurin standa sína roynd. Allir partar kenna avleiðingarnar, um ríkisstjórnin dumpar til royndina.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Frítíðarskúli fyri 2. flokk

**Jógvan Arge**
*býráðslimur*



Tey foreldur eru mong, sum nú merkja sviðan av, at Tórshavnar Býráð ikki hevur viljað syrgt fyri frítíðarskúla til bæði 1. og 2. flokk.

Minnilutin í býráðnum hevur á hvørjum ári hesa setuna havt uppskot um at skipa fyri, at eisini skúlabørnini í 2. flokki sleppa í frítíðarskúla eftir loknan skúladag, men vit hava ikki fingið meiriluta fyri uppskotinum.

Hetta var eitt av teimum málum, sum stóð á okkara stevnu til seinasta býráðsval, og tað verður aftur á stevnuni til hetta býráðsvalið.

Avgerðin kann kortini verða tikin longu áðrenn býráðsvalið í november.
Um nakrar dagar verður farið undir at viðgera fíggjarætlan Tórshavnar Býráðs fyri árið 2005, og tá fara vit enn einaferð at leggja til brots fyri at fáa frítíðarskúlan til eisini at umfata 2. flokk.

Sum nú er, reika børnini í 2. flokki býin runt at finna sær skjól og selskap til foreldrini einaferð koma aftur frá arbeiði. Tað er mikið gott, at børnini finna saman sjálvi, men kann vera ótrygt, og ið hvussu so er kenna nógv foreldur seg ótrygg.

Okkurt framstig liggur í kortunum. Ætlanir eru um at byggja ein lítlan skúla til smábørnini í Hoyvík, meðan bíðað verður eftir tí stóra skúlanum, og hesin smábarnaskúlin skal eisini brúkast til frítíðarskúla fyri 1. og 2. flokk, tá hann kemur.

Men tað hjálpir ikki teimum, sum hava trupulleikan í dag.

Býráðið alt hevur verið samt um at taka tøk til frama fyri barnaansingina hesa seinastu setuna, og nógv er eisini fingið frá hondini. Okkurt kundi verið betur frágingið, men tíverri hevur hugurin ikki rokkið til eitt frítíðartilboð til tey skúlabørnini, sum ganga í 2. flokki.

Tað eiga vit at bøta um sum skjótast.

# Steðgið manninun

**Nemus Nap Djurhuus**



Eg havi ikki loyvi at kalla Jógvan við Keldu rasist - men tað nærkast so ógvuliga nógv, at eg havið hug at gera tað, men eg lati vera, so eg ikki fái eina injuriusak á hálsin.

### Hvat bagir manninum

Nú má vera nokk við at Jógvan við Keldu heldur seg vera einaráðandi í Føroyum viðvíkjandi útlendingum, sum arbeiða, búgva her.

Hvat hava teir gjørt? Einki uttan tað, sum flestu føroyingar ikki tíma, arbeiða í fiskivinnuni, dugnalig og fryntlig fólk, ið hava valt annað land at integrera seg í og taka tað arbeiði, tey mun stendur í boði.

Eg kenni nógvar útlendingar, sum eru komnir til Føroyar at royna sína eydnu og eru so glaðir fyri Føroyar, at teir hava sligið røtur her, og tað skal vera teimum væl unt. Hesi fólk eru at sær komin, at tey royna at læra seg føroyska málið og føroyskar siðir!

### Til samgonguna

Ganga tit veruliga inn fyri at vit skulu forfylgja øllum útlendingum, sum ikki eru føroyskir ríksiborgarar (um nakað eitir so, tí vit eru jú øll danir) at tey skulu av landinum, tá teirra arbeiðs- og uppihaldsloyvi gongur út. Útreinskan av óynsktum fóklasløgum var onkur sum einaferð hevði í huga, og mundi hendan ætlan hansara næstan eydnast. Er tað veruliga so er illa statt í føroyskum politikki? Góðu menn og kvinnur á tingi. Takið nú í egnan barm og boðið frá, hvat tit veruliga meina vit ein útlendingapolitikk. Ella er meiningar tykkara bara ein orðaskavaldur?

### Til andstøðuna

Eg veit, at Tjóðveldisflokkurin hevði eina fulfíggjaða ætlan viðvíkjandi útlendingapolitikkinum - men lítið og einki er at hoyra um hesa ætlan. Hvat við at almennakungera, hvat ætlanin inniber?

Ikki ber til at sita hendur í favn og »bara« siga, at vit mótmæla. Andstøðan hevur sanniliga eisini ábyrgd hesum viðvíkjandi.

### Til Jógvan við Keldu

Góði keri fitti maður/vinur (ja tað meti/vóni at tað tú og eg er framvegis eru, tó ósamdir eru vit báðir) tak í egnan barm ella okkurt annað. Lat ikki okkum føroyingar koma í ringt orð um allan heim sum rasistar og óvinarligar móti øllum útlendingum, sum royna at lívbjarga sær og sínum, eisini Føroyum. Flestu sum koma til Føroyar eru dugnalig og vita, hvørji krøv eru galdandi í Føroyum, tá tey koma.

Tú er ikki longur býráðsformaður í Klaksvík, men landsstýrismaður fyri allar føroyingar, og tað krevur sín mann.

Vís nú, at tú er tann stórpolittakari, tú metir teg sjálvan vera.

**PS:** Viðmerkingar um útlensk ítróttarfólk kemur seinni, tó tann spurningurin hevur skund.

Vinarliga og við bestu kvøðum til tín.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.
Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Áki Andreasen - døggutar brillur ella??

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*



Undirritaði hevði eina grein um trupulleikan við endurtøkuni av monopolinum á flogleiðini millum Føroyar og Danmark og viðgjørdi eisini í greinini, hvørt Landsstýrið áhaldandi skuldi subsidiera almenna flogfelagið ella einskilja tað í nærmastu framtíð.

Eisini kom eg inn á, hvussu umráðandi tað er at fáa flogvøllin longdan og uppdateraðan.

Áki Andreasen er ikki sørt frustreraður í síni viðger av hesi grein, undirritaða og Sambandsflokkinum - og hevur tíverri lisið greinina sum ein ávísur lesur Halgubók, tí ONKI í hansara viðmerkingum til greinina heldur vatn og er ein forbronglan av veruliga innihaldinum og tí, sum verður tikið fram í greinini. Ístaðin fyri at viðgera veruliga málið sum er:

1. Trupulleikin við endurskapta monopolinum og tað óansæð um tað er Atlantic, Mærsk, ella annað felag, sum hevur hesa serstøðu - vit vilja als ikki hava monopol, hvørki á hesi leið ella arðastaðni í vinnuni.

2. Serstøðuna sum Atlantic hevur og sum partvís var tikin fram í greinini

3. Fría kapping á flogøkinum - ella rættari vantandi fría kappingin at fáa loyst upp fyri hesum trupulleika og veruliga fáa fría kapping.

4. Flogvallatrupulleikin - at hesin má leingjast og uppdaterast viðv. trygd.o.ø

Hesi vóru evnini, ið viðgjørd vóru, men ístaðin fyri at viðgera hesi mál seriøst, so kemur tað vanliga tjóveldistvætlið um, hvat teir hava bygt og hinir brotið niður, hvat teir hava torað og hinir ikki.

Tað sær út til, at tað enn hóast 6 ára oyðmarkar-fullveldisgongd, - so er áhaldandi sera umráðandi at gera vart við, at »VIT« tjóveldismenn er teir einastu samvitskufullu, vinnuliga reinføru og rætthugsandi føroyingarnir.

Hasa plátuna hava vit hoyrt og sæð nokk av seinastu árini.

Harrin náði okkum um tað høvdu verið hesir, sum bygdu land, so høvdu vit allir enn gingið í kotinum og húðaskóm.

Eg kundi hóskandi spurt Áka:

– Heldur tú tað vera í lagi, at vit aftur enn einaferð fáa monopol á Føroyarutuni, og hvat metir tú størsta orsøkin er til, at vit aftur enda í hesi støðu?

– Heldur tú tað vera í lagi áhaldandi at geva Atlantic Airways sersømdir, sum m. a. tær,ið nevndar vórðu í greinini?

– Heldur tú tað er í lagið, at stuðul er eitt banniorð hjá nøkrum vinnum, men ørðum nærmast frítt slag??

– Heldur tú tað er í lagið, ikki at hava fría kapping á flúgving til og frá Føroyum?

– Skulu vit framvegis í besta kommunistastílið, áhaldandi lata landið eiga størsta partin av vinnutólunum, sum eitt nú Atlantic Airways?

– Heldur tú ikki, at flogvøllurin skal leingjast skjótast møguligt?

Aftursvarið viðv. pástandinum um Sambandsflokkin og hvat hansara støðu er og hevur verið viðv. Atlantic, haldi eg, at greinin hjá Helga Abrahamsen greitt sigur frá okkara støðu, men tað sær heldur ikki út til hesum viðv, at Áki hevur gjørt sítt heimaarbeiðið gott nokk .

Mín grein er als ikki eitt álop á Atlantic Airways, men einans ein konstatering av nøkrum fakta, har eg seti spurnartekin við nøkur vital ting, sum eiga at verða tikin upp til viðgerðar alment og politiskt. Sjálvur haldi eg, at Atlantic Airways (eins og fleiri onnur almenn feløg) eigur at blíva einskilt í nærmastu framtíð og fáa fríar teymar og kappast á jøvnum føti við onnur flogfeløg í Evropa eins væl og á Føroyrutuni.

Tað vil gagna og menna felagið og vónandi geva brúkarunum bestu sømdir og servisu.

Áki Andreasen og arðir »rætthugsandi« áttu eftirhondini at umhugsa, um ikki teir burdu slept ostaklokku- og húðaskógvamentalitetinum og latið eyguni upp út í heim - sæð møguleikarnir og skapt nakað burturúr hesum ístaðin fyri áhaldandi at goyggja at øllum ørðum, sum ikki hugsa so snævurskygt sum teir sjálvir.

# Okkara løgmaður liggur á øllum fýra

**Sjúrður Skaale**



Jóannes Eidesgaard vanvirðir eina einmælta samtykt hjá løgtinginum og sleikir teir skógvarnar, sum traðka á hesa samtykt

Óli Breckmann lat ongan iva vera, tá hann upp undir valið varð spurdur um útlendingapolitikk. Stendur tað til Fólkaflokkin, skulu fólk, sum ikki hava hjálpt føroyingum, ikki vænta sær nakra hjálp hiðani heldur - uttan mun til, hvussu neyðstødd tey eru. Og tað »draslið« og tær »hordir av fólki« sum »rekast um heimin«, skulu sjálvsagt haldast úti úr Føroyum.

Orðavalið minti um tíðina í sjey- og áttatiárunum, tá maðurin hálovaði fasistum og rasistum.

Eftir valið slapp Breckmannsa flokkur at umsita júst útlendingamál. Og tað gongur sjón fyri søgn. Sjálvt fólk, sum hava kastað síni akker í Føroyum og hava arbeitt og virkað saman við føroyingum í áravís, verða rikin á dyr.

Nógv halda hetta vera landaskomm. Og tað kann heldur ikki hóva manninum við evstu ábyrgdini, Jóannesi Eidesgaard. Men hann vil so ræðuliga illa vera løgmaður. So illa, at hann fegin grulvar fyri øllum teimum, sum vilja gera hann til løgmann. Tí grulvar hann eisini fyri teimum, sum nú seta stavnamannsins sjúku hugsanir í verk.

Í málinum um skattalættan er sama søgan. Javnaðarflokkurin er ímóti, men Jóannes grulvar fyri sambandi og fólkaflokki, tí hesir hava valt hann til løgmann.

### Norðurlandaráðið

Men tað syndarligasta dømi er kanska málið um limaskap í Norðurlandaráðnum.

Í fjør samtykti Føroya løgting einmælt, at virkast skal fyri fullum limaskapi í ráðnum - men danska stjórnin segði nei.

Millum tey, ið atkvøddu fyri samtyktini, var Jóannes Eidesgaard, løgtingsmaður. Nú er maðurin løgmaður. Nú er tað hann, sum skal verja samtyktina, og stríðast fyri at fáa hana ígjøgnum. Ella - tað skuldi ein ið hvussu er hildið. Ein politiskur leiðari stendur jú fyrst og fremst til svars fyri sínum egna parlamenti og sínum egna fólki.

Men soleiðis hugsar Jóannes Eidesgaard ikki.

Nú skulu vit ikki stríðast við danir, sigur hann. Nú skal valda friður og semja, messar hann upp í saman. Men her er ikki semja. Eitt fullsamt løgting vil hava limaskap í Norðurlandaráðnum. Og danska stjórnin sigur nei.

Hvat ger so Jóannes Eidesgaard? Stendur hann fast við tað, sum er føroyski viljin? Stríðist hann fyri tí, sum løgtingið hevur samtykt? Stendur maðurin - ella grulvar hann?

### Sleikir skógvarnar

Longu í ólavsøkurøðuni varð greitt, at Eidesgaard hevur hug at grulva. Og tað varð staðfest í farnu viku, tá Per Stig Møller kom til Føroya.

Per Stig endurtók tey boð, at Føroyar ikki kunnu vera limir í Norðurlandaráðnum, tí danska grundlógin forðar tí. Øll, sum bara hava minsta vet av innliti, vita, at hetta er nakað slutur. Grundlógin er undanførsla. Tað, sum hendir, er, at danska stjórnin traðkar á eina demokratiska, føroyska samtykt. Tað veit Jóannes Eidesgaard eisini sjálvur.

Men hann ikki so mikið sum mutaði ímóti tí arroganta frekleikanum hjá Per Stig Møller. Hann vildi bara hava frið og semju. Og til tess at fáa frið og semju, legði hann seg sum ein hund fyri føturnar á danska uttanríkisráðharranum og sleikti honum um skógvarnar. Har var eingin sjálvsvirðing. Har var enn minni nakar stoltleiki.

Hjá Jóannesi taldi tað meira at vera samdur við Per Stig Møller enn at verja ta lógligu, demokratiska og einmæltu samtyktina hjá løgtinginum.

Samstundis leggur okkara løgmaður upp til, at løgtingið nú skal ganga frá síni egnu samtykt. Eini samtykt, sum maðurin sjálvur tók undir við...

Eg vil heldur doyggja standandi enn liva grulvandi, segði ein kendur maður.

So idealistisk kunnu øll sjálvsagt ikki vera. Men Jóannes Eidesgaard er so fúsur at grulva fyri at sleppa at liva í friði sum løgmaður, at tað er ræðuliga pínligt at síggja.

Og tað ringasta er, at hann umboðar okkum øll. Tá okkara løgmaður er ein ryggleysur grulvari, so verður á ein hátt øll tjóðin ein ryggleysur grulvari.

# Áheitan á Landsverkfrøðingin og Vinnumálaráði

**Tummas Eli H. Joensen**



Í farnu viku svaraði Bjarni Djurholm einum fyrispurningi á tingi frá Tórbjørn Jacobsen viðvíkjandi vegastrekkinum Skálabotnur - Strendur. Bjarni Djurholm segði í svarinum, at arbeiðið við vegagerðini verður tikið uppaftur nú, og at tað verður boðið út í hesi vikuni.

Higartil í ár er einki arbeiði gjørt á økinum, í øllum førum ikki soleiðis, at vit bilførara ið koyra dagliga framvið hava borið eyga við tað. Kann verða, at landsverkfrøðingurin hevur valt at nýta játtanina í ár síðst í árinum, fyri at kunna leggja arbeiði næsta ár í forleingilsi av arbeiðinum í ár, og soleiðis fáða tvey ára arbeiði gjørt í einum. Um hetta er ætlanin, skuldi hetta alt annað líka givið betur úrtøku fyri pengingin, tí ein flyting av amboðunum verður spard á henda hátt og tí meiri arbeiði gjørt.

Hevði tó tann tíð tað var vóna, at Løgtingið tók seg saman og gjørdu eina annlegslóg fyri hetta vegastrekkið, havandi í hyggju, at hetta arbeiði ikki má draga ov langt út. Fyri at siga tað stutt, so er okkara veganet ikki nøktandi til alt ið skal flytast aftur og fram og eg haldi eisini, at veganetið er beinleiðis ein foran fyri, at vestari armur mennur seg meira vinnuliga.

Eg fari, nú tað sær út til, at arbeiði fer í gongd aftur, og at tað kanska er við 2 ára arbeiði í ætlan, at heita á Landsverkfrøðingin og Vinnumálaráði um, at arbeiðið á hesum sinni verður byrjað frá Strondum av og inneftir. Um arbeitt verður innanífrá og úteftir, er vandi fyri, at tá vegurin er komin út um Skála bygd, verður ein fyribils vegur gjørdur oman í verandi veg, og so verður ikki komið víðari. Verður harafturímóti arbeitt uttanífrá og inneftir, verður neyðugt at binda vegin saman, fyri at fáa nyttu av íløguni. Harvið verða tann politiski myndugleikin bundin til ikki at gevast, fyrr enn alt arbeiðið er liðugt. - Og tað er neyðugt!